# 550 limir




## Hoyring í Trivnaðarnevndini

Bjørg Dam
Poula Patursson
Eyð-britt Tjaldrastein

ADHD FELAGIÐ

Viðmerkingar til broyting av løgtingslóg um Heilsutrygd

8.nov 2023

# Heilivágur tryggjar gerandisdegin

Concerta Heilivágurin virkar so mikið væl, at man er farin frá ca 1,5 Stjørnur í miðal, og upp á 5 stjørnur í miðal 🤩🤩🤩

Hettar er ein statistikkur í einum sum vurderar hvussu væl tú dugur at koyra, og síðan man byrjaði uppá heilivágin, tóru stjørnurnar, at vekse ógvuliga 🤩😊




Hey tit... Nú havi eg verið á heilivágið í skjótt 2 ár, og tað sum er mest Ótrúligt við hesum, at eg havi eisini í hettar sama tíðarskeiði klára at haft eitt stabilt kærleiksliv, og kann telja ósemjurnar á einari hond ❤️

Eg havi eisini ongantíð sum óviðgjørdur kunna klára at haft eina krónu á kontu, uttan hon helst var brúkt áðrenn hon kom inn á konto... Nú tosa vit um at man er á gáttini, at man hevur eginpening nokk til at fáa egnan bústað ❤️

Samstundis eri eg forbetraður ótrúliga nógv í mínum starvið sum chauffør, og vandin fyri at eg geri nakað býtt í ferðsluni kanska minkaður eini 90%, og slit á bremsur, og dekk er minka ógviligt. Bilurin hjá arbeiðgevarnum, hevur eina skipan, sum gevur próvtal, fyri hvussu skynsamt tú koyrir. Tað plagdi at vera so lágt sum 25%, og nú kléri eg heilt upp á 90% viðhvørt ❤️

Ótrúligt sum eg eri takksamur fyri hendan møguleikan eg fekk at liva eitt gott lív, og hevði tað ikki verið fyri Barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu hevði eg aldrin fingi nakra hjálp, og fekk enntá stuðul til sjálva útgreiningina 🤩🤩🤩

Tað negativa er bara at vit framvegis eru so stigmatiseraði, og tað er so ræðuliga tungt at fáa heilivág útflyggjaðan, og tann parturin hevur veri ótrúliga tungur 😢 men vónandi gerst alt betri ❤️

Takk fyri at eg sleppi at vera ein partur av tykkum, og gott vikuskiftið ❤️😊








# Heilivágur neyðugur

-Heilivágurin ger, at ung megna skúlan, vaksin sítt arbeiði og foreldur við ADHD, megna gerandisdagin við børnum og halda hús og heim.

-Áleið 70-80% av fólkum við ADHD fáa munandi gagn av ADHD heilivági.

# Útbúgving

-33% við ADHD hava miðnámsútbúgving, í mun til 80%
-10% hava eina longri útbúgving ímun til 33%
- +30% av vaksnum við ADHD eru í láglønarbólkum, til samanberingar við 7% av øllum.

ADHD er 80% arvaligt
Tí eru familjur, ið hava 1-4 x útr. til heilivág

# Gjógvin millum rík og fátøk vaksur

-Foreldur royna at rinda heilivágin fyri tey ungu, helst ímeðan tey ganga í skúla.
-Hægri kostnaður økir um fátækaragjónna, tí sperd foreldur fara at hava verri ráð at fíggja heilivágin hjá børnunum

- Lesandi uttan ressursufull foreldur, hava ongan møguleika

-Sostatt er hettar við til at fastlæsa ein bólk við breki sosialt, sum hagtøl annar vísa, klárar seg líka væl sum onnur, tá tey fáa viðgerð.

# Ynski: Ókeypis heilivágur lesandi

Endamál: At fólk við ADHD blíva sjálvstøðugir borgarar

-Lesandi skula fáa heilivág ókeypis, tí brekið ger, at tey skula brúka alla sína orku uppá skúlan, ístaðin fyri at arbeiða fyri heilivág.

- Kostar heilivágurin ov nógv, er einasti mátin at nøkur ung lesandi kunna fíggja heilivágin við sølu

ADHD FELAGIÐ

# Viðmerkingar til broyting av løgtingslóg um serliga stuðulsveiting

8.nov 2023

# Orsøkir til broytingaruppskotið eru

- "Almenni útreiðsluvøksturin skal tálmast. Sum ein liður í sparitiltøkum í sambandi við fíggjarlógina 2024, er ætlanin, at ung í vanligum útbúgvingaraldri ikki skulu hava rætt til stuðulsveiting sbrt. løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk aftrat lestrarstuðli. Ung við serligum tørvi verða sostatt javnsett við lesandi, ið ikki hava serligan tørv."

# "Líka fyri øll" ella rættvísi?

- At taka serligu stuðulsveitingina burtur fyri lesandi við sálarligum avbjóðingum ger tað nærum ógjørligt at megna lesnaðin.

- Tey verða netupp **ikki javnsett** við onnur lesandi!



# Lesandi við ADHD

- Undir 10% av vaksnum við ADHD hava eina víðarigangandi útbúgving.
- Og 25% av ungum við ADHD í aldrinum 15-24 ár standa uttanfyri skúlaskipanina og arbeiðsmarknaðin
- Lesandi við ADHD brúka nógv meira orku uppá at vera lesandi enn onnur. Tað krevur nógv at skipa dagin, man troyttast skjótari og hevur meira tørv á pausum og at "løðast uppaftur".
- Skúlatíðin kann hjá nógvum hava verið hørð, har tey hava kent seg forkert, eru blivin skeldað meira enn hini og enda tí við vánaligum sjálvsvirði.
- Tað gongur útyvir sálarheilsuna, og tey fáa oftari hjádiagnosur sum angist og tunglyndi.

(donsk tøl 2018 og 2022)

ADHD FELAGIÐ

# Hví stuðulsveiting til lesandi?

- Tí er tað av alstórum týdningi at tey hava møguleika fyri at fáa alla ta hjálp tey kunnu, eisini fíggjarliga.
- Tí skulu tey út at finna sær arbeiði fyri at klára seg fíggjarliga, verða tey meira sperd og eru tí í høgum vanda fyri at gevast.
- Tey harðast raktu megna ikki bæði skúla og arbeiði!
- Tá eru vit sum samfelagi við til at halda fast í tølunum, sum vísa, at tað eru nógv færri við ADHD, sum megna skúla og at fáa sær útbúgving.

ADHD FELAGIÐ

# ADHD felagið

- Vit sum ADHD felag standa spyrjandi!
- Hvussu ber tað til, at man sparir hesa lívsneyðugu veiting til okkara veikastu borgarar?
- Heldur man, at við at taka eina veiting burtur, so hvørvur diagnosan og serligi tørvurin?
- Hvussu nógv sparir man við at taka hesa veiting burtur til hesi 67 næmingarnar?
- Og í síðsta enda, blívur hetta óivað ein eyka útreiðsla fyri samfelagið!
    - (fyritíðarpensjón, psykiatrisk viðgerð, misnýtsla osv.)

Hjartaliga takk fyri

8.nov 2023